í stuttum

Lagt til rættis: Eyðun Klakstein



## Dani fær stóran leiklut í USA

36 ára gamli danski sjónleikarin Nicolaj Coster Waldau kann rokna við at gerast landskendur í USA í næstum. Hann hevur nevniliga fingið høvuðsleiklutin í eini nýggjari sjónvarpsrøð, sum hevur fingið heitið New Amsterdam. Í røðini spælir Waldau ein løgreglumaður, sum hevur livað í 400 ár og ikki kann doyggja.

Tað er felagið Fox, sum framleiðir nýggju røðina, og hon hevur nógv at liva upp til, tí hon skal avloysa Prison Break, sum hevur verið sera vælumtókt.

Roknað verður við, at danska TV3 fer at sendi New Amsterdam í heyst.



## Kalt brúsubað

Brody er ein golden retriever, og hann var blivin nakað heitur nú um dagarnar, tá ið hann hevði spælt sær í eini park í Wyoming. Brody hevur ikki vatnskrekk, so hann brúkti eitt springvatn í parkini til at køla seg av.

## Spielberg og Jackson gera Tintin



Tað verður við spenningi sæð fram til, at Tintin fyri fyrstu ferð skal gerast til veruligan film. Spenningurin verður ikki minni av, nú tað er váttað, at leikstjórarnir fara at eita Steven Spielberg og Peter Jackson. Ætlanin er í fyrstu syftu at gera tríggjar filmar um Tintin, og tann fyrsta skal Spielberg leikstjórna. Annan filmin í røðini skal Peter Jackson so standa fyri. Eftir hetta verður gjørt av, hvør skal gera tann triðja filmin um belgiska detektivin, sum

## Gera gjøldur við Grand Prixnum



Dan Mazer, sum hevur skrivað leikritið til filmin um Borat, og Damian Jones, sum framleiddi sama filmin, eru í holt við fyrireikingarnar til teirra næsta film. Hann fer at snúgva seg um Melodi Grand Prixið, og ætlanin við nýggja filminum er at gera gjøldur við sangkappingini, sum verður varpað í sjónvarpi kring alt Europa einaferð um árið.



## Raka tær so

Mangt og hvat verður gjørt av kátum ítróttarfólki, tá ið teir fegnast um ein góðan sigur. Á myndini er tað Jesse Litch, sum spælir baseball við Toronto Blues, sum hevur fingið eina ordans sending av barberskúmi í andliti. Hetta syrgdi ein av liðfeløgunum fyri, eftir at Tornoto Blues høvdu vunnið ein dyst ímóti Orioles.

Sosialurin